# Tilboðsfyrispurningur

Viðvíkjandi skrivstovuinnbúgvi

Mars 2021

# Innihald


1 Innleiðing ........ 3
2 Kontaktpersónar ........ 3
3 Vavi á útboði ........ 3
4 Mannagongd og krøv ........ 3
4.1 Lýsing og krøv til innbúgv ........ 3
4.2 Framvísing og skjøl ........ 4
4.3 Tíðarætlan ........ 4
4.4 Tillutan og vekt ........ 4
4.5 Dómsnevnd ........ 5
5 Viðstøða, fyrivarni, alment innlit og ogn ........ 5
5.1 Viðstøða ........ 5
5.2 Fyrivarni ........ 5
5.3 Alment innlit ........ 6
5.4 Ogn ........ 6
5.5 Havnan av tilboðum ........ 6

# 1 Innleiðing

Við hesum skrivi ynskir Gjaldstovan við Keyp Landsins at biðja um tilboð upp á skrivstovuinnbúgv.

Útboðið verður gjørt sambært “Rundskriv nr. 9003 frá 1. Juli 2019 um keyp av vørum og tænastum”.

Útboðstilfarið inniheldur afturat hesum skjali eisini skjølini

- “20210305 Prístalva at fylla út - Gjaldstovan keyp av innbúgv.xslx”
- “20210305 Myndir av núverandi innbúgvi - Gjaldstovan keyp av innbúgv.pdf”
- “20210305 Flatmynd2 av 2 hædd - Gjaldstovan keyp av innbúgv.pdf”

# 2 Kontaktpersónar

Útbjóðari er Gjaldstovan við Keyp Landsins. Kontaktpersónar eru:

1. Kim Hansen, Fulltrúi, kim@gjaldstovan.fo, +298 281581
2. Guðny Simonsen, Leiðari, Fyrisiting, gudny@gjaldstonva.fo, +298 214965

# 3 Vavi á útboði

1. 20 Skrivaraborð
2. 10 Ljóðskermar
3. 20 Rulluskáp (10 vinstravend og 10 høgravend)
4. 20 Skrivstovustólar
5. Uppsetan og upprudding

# 4 Mannagongd og krøv

## 4.1 Lýsing og krøv til innbúgv

Gjaldstovan hevur í dag borð av merkinum Jazz, skáp av merkinum Jive Maxi og stólar av merkinum Kinnarp. Nýggja innbúgvið skal vera egnað til skrivstovuvirksemið hjá Gjaldstovuni, liva upp til arkitekturin, skap og litir og styrkja samleikan. Harafturat skal innbúgvið innanfyri eina ávísa rímiligheit, liva upp til góðskuna á núverandi.

*Borð til skrivstovurnar*: Stødd 80x160. Borðpláta, hvít úr plasttilfari, linoleum ella finer. Borðbein úr rustfríum stáli ella krom. Borðkantarnir eru útsettir fyri stoytum, tí skulu teir vera styrktir við t.d. plastikki. Talan skal vera um elektrisk upp og niður (elektriske hæve/sænke) borð.

*Ljóðskermar:* Stødd 45x160, hvítir.

*Skáp:* 80x115x45, hvít við hillum, ið kunnu hálast út.

*Skrivstovustólar:* Svartir við og uttan stólarmar.

## 4.2 Framvísing og skjøl

Veitarin skal við teksti og myndum lýsa innbúgvið. Umráðandi er, at myndir og tekstur eru á sama arki, og framløgutilfarið skal vera stutt, greitt og ikki fleiri enn 6 síður, umframt prístalvuna í fylgiskjali A.

Veitarin skal hava møguleika at vísa vøruna fram. Er vøran ikki á goymslu ella nýggj, skal veitarin vísa á kunda, har møguligt er at síggja líknandi vøru.

## 4.3 Tíðarætlan

| | |
|---|---|
| Tilboðsfyrispurningur á Keypsportalin | 5. mars. 2021 |
| Sýn av hølum | 10. mars. 2021 kl. 13 |
| Spurnaðafreist | 15. mars. 2021 |
| Tilboðsfreist | 17. mars. 2021 kl. 13. |
| Avgerð og kunngerð av vinnara | 18. mars. 2020 |
| Levering og uppseting | 9. apríl. 2020 |

Tilboð íroknað fylgisskjøl skulu sendast umvegis teldupost til kim@gjaldstovan.fo.

Sýn fer fram á Kvíggjartúni 1 á Argjum. Av praktiskum ávum, verða tit biðin um at boða frá, um tykkara fyritøka ætlar at luttaka, og hvussu nógv koma (tó ikki fleiri enn 2 umboð fyri hvønn tilboðsgevara). Fráboðast skal í seinasta lagi mánadagin 8. mars. Fráboðanin fer fram við at senda teldupost til Guðny Simonsen umvegis teldupost gudny@gjaldstovan.fo. Frásøgn frá spyrjifundinum verður løgd út á keypsportalin skjótast gjørligt.

Spurningar skulu sendast til til Guðny Simonsen umvegis teldupost gudny@gjaldstovan.fo. Eftir viðgerð av spurningum verður um neyðugt, gjørd rættingarbløð til útboðstilfarið.

## 4.4 Tillutan og vekt

1. Kostnaður 50%
2. Góðska 50%.

Viðvíkjandi kostnaðinum. Øll góðkend tilboð fáa ein karakter frá 0 til 10 eftir frymlinum:

$$10 * \frac{\text{Lægsta prís}}{\text{Hægsta prís}}$$

Við tillutarnartreytini “Góðska” skulu skiljast hesar undir-tillutarnartreytir:

- Snið
- Virkisføri
- Góðska
- Garanti

*Snið:* Tað hevur týdning, at sniðið hevur eitt gott samanspæl og passar til núverandi innbúgv.

*Virskisføri:* Umráðandi er, at innbúgvið er lætt at viðlíkahalda og vaska. Harafturat, at innbúgvið hevur sama funktionalitet sum núverandi innbúgv. Tað er t.d. at borðini og stólar kunnu stillast inn eftir tørvi.

*Góðska:* Tað hevur stóran týdning at borðini eru stabil og stólarnir eru slitsterkir. Kantar o.t. skal hava høgt finish. Tað er fyrimunur, um veitari kann prógva haldførið av pólstring og liti.

*Garanti:* Tað hevur týdning, hvussu langt tíðarskeið garantiið er galdandi.

Raðfylgjan hevur ongan týdning, og tillutaður verður ein karakterur frá 0 til 10, ið byggir á eina heildarmynd.

Tilboðið við hægsta karakteri, eftir at hann er vektaður 50/50 fyri ávíkavist prís og góðsku, vinnur útboðið.

Vinnari og samlaði kostnaðurin verður kunngjørdur á keypsportalinum.

### 4.5 Dómsnevnd

Dómsnevnd mannað av umboðum frá Gjaldstovuni meta um góðskuna á vøruni. Er neyðugt, verður serkunnleiki brúktur at hjálpa til við dømingini.

## 5 Viðstøða, fyrivarni, alment innlit og ogn

### 5.1 Viðstøða

Innlatin tilboð skulu standa við í 3 mðr. eftir at tilboðsfreistin er farin.

### 5.2 Fyrivarni

Tann, ið letur inn tilboð, eigur at hugsa um fyrivarni í mun til útboðstilfarið. Eitthvørt fyrivarni viðførir at úbjóðari kann vísa burtur innlatið tilboð.

## 5.3 Alment innlit

Tann, ið letur inn tilboð skal eisini vera varur við, at Gjaldstovan  við Keyps Landsins er fevnt lóg um alment innlit: “Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina”

## 5.4 Ogn

Øll innlatin tilboð við fylgiskjølum eru ogn hjá Gjaldstovuni,  og verða ikki send aftur til tilboðsgevara.

## 5.5 Havnan av tilboðum

Gjaldstovan tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum. Gjaldstovan tilskilar sær eisini rætt til at havna einum tilboði (sum um talan var um undangóðkenning), um vøran á órímiligan hátt ikki livir upp til góðskuna, sniðið og virkisførið, ið Gjaldstovan brúkar í dag.